# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Bilstøðin Auto seld

**Bilstøðin Auto í Niels Finsensgøtu í Havn er nú seld til eitt nýtt partafelag, sum heldur fram við sama navnið og sama telefonnummari**

SØLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bilførarar, støðgentur og nakrir av fyrrverandi partaeigarunum á bilstøðini Auto hava stovnað eitt nýtt partafelag og hava keypt bygningin í N. Finsensgøtu við innbúgvi og rakstrargøgnum.

Nýggja felagið yvirtók støðina 1. mars, og í nýggju nevndini sita Karsten Jensen, Heðin Mouritsen, Danny Danielsen og Eyðbjart Danielsen. Nevndin hevur skipað seg við Karsten Jensen sum nevndarformanni og Peturi Splidt er settur sum stjóri.

Auto er ein bilstøð við bensinsølu og kiosk. Nýggi nevndarformaðurin Karsten Jensen sigur, at teir fara at leggja dent á enn betri tænastu og koma í fyrstu atløgu at hava størri vøruúrval í kioskini við eitt nú mjólk og ætlanin er eisini at selja aðrar vørur sum t.d. tannbustir, tannkrem, wc-pappír, bind, kaffi og kanska eisini smør og ost.

Partafelagið, sum nú fer í søguna, var stovnað í 1952 sum P/F Taxa og skifti í 1955 navn til Auto. Í nevndini í gamla felagnum sótu Atli Simonsen, Lina av Reyni og Mortan Simonsen.



*Nevnd og stjórn í Auto, f.v.: Danny Danielsen, nevndarlimur, Petur Splidt, stjóri, Eyðbjartur Danielsen, nevndarlimur, Karsten Jensen, nevndarformaður, og Heðin Mouritsen, nevndarlimur*

## Shell sóknast eftir bilførara

Eitt starv sum tangabilførari hjá Føroya Shell í Havn er leyst at søkja at seta sum skjótast.

**Tann, vit leita eftir**
Er nærlagdur og leggur dent á trygga koyring og góða kundatænastu. Stórt koyrikoyrt er krav, og umsøkjarar, ið eru vanir við tunga ferðslu, hava fyrimun.

**Vit kunnu bjóða**
Góðar arbeiðsumstøður og løn sambært sáttmála við Havnar Arbeiðsmannafelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Andrias Jacobsen á telefon 34 74 00.

Hevur hetta tín áhuga, send okkum umsókn tína sum skjótast, annaðhvørt til: Føroya Shell, postboks 188, 110 Tórshavn, ella sum teldubræv til shell@shell.fo

REPROZ



**Hugsar tú um eina betri framtíð?**
**www.shell.fo**

**Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 8 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn**
**Telefon 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo**

Starvslýsing



## MONTØR

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiði fevnir í høvuðsheitinum um at røkja ymiskar montøruppgávur, so sum uppsetan av skeltum, ásetan av bilreklamun og aðrar tilsvarandi montøruppgávur.
Fyri rætta fólkið er talan um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Setanartreytir**
Setanartreytir sambært nærri avtalu.

Løn eftir nærri avtalu

Starvið verður sett 16. mars. 2007 ella skjótast til ber.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari við viðkomandi útbúgving innan handverkið og helst royndir innan omanfyri nevndu arbeiðsøki hava fyrimun.
Tað er umráðandi at tann ið settur verður, hevur góð samstarvsevni, og dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarleið (cv) verða at senda Sp/f KARMUR, postboks 17, 510 Gøta.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Poul Helga Jacobsen, Tel 44 20 42, Fartel 58 20 41 ella phj@karmur.fo

karmur.fo

REKLAMUVIRKIÐ
**KARMUR**

Tel.: 44 20 42 | Fax: 44 21 42 | P.O.Boks 17 | FO- 510 Gøta